Tjóðskjalasavnið

## Heimlán av avhendaðum skjølum

Allir almennir stovnar, sum hava avhendað skjøl til Tjóðskjalasavnið, kunnu lána tey skjøl, tey sjálvi hava avhendað, heim á stovnin. Hetta verður í vanligari talu nevnt heimlán.

Lánitíðin er 3 mánaðir.

Stovnar kunnu lána skjøl, sum hava við teirra virksemið at gera, frá stovnum, hvørs virksemi stovnurin heilt ella partvís hevur yvirtikið.

Umbøn um heimlán verður send Tjóðskjalasavninum í minsta lagi 3 yrkadagar áðrenn skjølini skulu brúkast. Okkara T-post er: skjalasavn@skjalasavn.fo

## Í umbønini skal standa

- Navn á stovni
- Navn á tí, sum biður um ella ið skal brúka skjølini
- Ár og journalnummar á skjølunum
- Hvørji viðurskifti málið snýr seg um

Starvsfólk á Tjóðskjalasavninum kunnu hjálpa við at finna einstøk skjøl fram.

Skjølini verða heintað og latin inn aftur á lesistovuna hjá Tjóðskjalasavninum í V.U. Hammershaimbsgøta 11, kj.

V. U. Hammershaimbsgøta 18 - FO-100 Tórshavn - Te-. + 298 340 540 - T-postur: skjalasavn@skjalasavn.fo